# ítróttur

Nr. 46 • mánadagur • 6. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Leita eftir dysti til landsliðið í mai

**Fótbóltssambandið roynir at fáa í lag venjingardyst ímóti Íslandi, men letur tað seg ikki gera, verður farið at leita eftir øðrum landi at spæla ímóti. Eysturríki við Hickersberger á odda kundi verið ein møguleiki**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Stendur tað til Fótbóltssambandið, fara Føroyar og Ísland at spæla venjingardyst í fótbólti síðst í mai mánaði ella fyrst í juni.

Føroyar skulu hava ein venjingardyst afturat, áðrenn EM-undankappingin byrjar eftir summarsteðgin, og Ísland stendur fremst í røðini.

Føroyar og Ísland hava havt eitt gamalt samstarv um landsdystir, og avtalan hevur verið, at dystirnir hava verið í Føroyum og Íslandi upp á skift. Tá ið Føroyar og Ísland endaðu í sama bólki til seinastu EM-undankappingina duttu venjingardystirnir burtur, tí nú stóð meira upp á spæl í eina tíð.

Síðani hevur eingin venjingardystur verið ímillum Føroyar og Ísland, men Fótbóltssambandið vil gjarna hava, at gamla samstarvið við íslendingar kemur aftur í lag, so londini javnan spæla dystir ímóti hvørjum øðrum.




*FSF ætlar, at fótbóltslandsliðið skal fyrireika seg til EM-undankappingina í heyst við venjingardysti í mai ella juni*

### Kanska Hickersberger

Íslendingar hava fingið ein fyrispurning frá Føroyum, og teir hava lovað at svarað innan stutta tíð. Íslendingar ætla sær sjálvir at spæla venjingardyst um tað mundið, men møguliga ætla teir at finna sær aðra fótbóltstjóð enn Føroyar at spæla ímóti.

Verður dysturin ímóti íslendingum av ongum, ætlar Fótbóltssambandið at finna annað land at spæla venjingardyst ímóti, og eitt boð kundi verið Eysturríki.

Nýggi landsliðsvenjarin hjá Eysturríki er tann sami, sum stóð á odda fyri liðnum í 1990, tá ið Føroyar vunnu í Landskrona. Tá fekk Josef Hickersberger sekkin, men hann er nú aftur blivin landsliðsvenjari í Eysturríki.

Hann hevur sagt við eitt blað, at hann vil fegin spæla aftur ímóti Føroyum, so hvør veit, um hann ikki fær tilboðið í næstum.

# Súni og Jón Rói nærkast steypafinaluni

**Tað eydnaðist teimum báðum føroyingunum í danska superligafelagnum AaB at spæla seg í hálvfinaluna í donsku steypakappingini sunnudagin. Súni Olsen var ein av skjúttunum í brotssparkskappingini, sum dysturin endaði við**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Føroysku landsliðsspælararnir í AaB, Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen, vóru báðir á vøllinum, tá ið AaB sunnudagin vann fjórðingsfinaluna í donsku steypakappingini ímóti OB.

Fjórðinsfinalan var leikt á Aalborg Stadion, og bæði Súni Olsen og Jón Rói Jacobsen byrjaðu dystin á beinkinum.

Jón Rói kom á vøllin stutt undan, at vanliga leiktíðin var lokin. Tá var støðan 2-1 til AaB, men OB javnaði í næstseinasta minuttinum.

### Súni skoraði

Síðani var farið til longda leiktíð, men har kom einki mál, og tí var neyðugt við brotssparkum fyri at finna ein vinnara.

Súni Olsen var komin á vøllin stutt fyri, at longda leiktíðin var av, og hann var fjórði brotssparksskjútti hjá AaB, og gøtumaðurin sveik ikki álitið.



*Súni Olsen skoraði, tá ið AaB vann á OB í brotssparkskapping*

Neyðugt var tó við ikki færri níggju brotssparkum í part, áðrenn ein vinnari var funnin, og tað var liðið hjá føroyingunum báðum, sum dróg longra stráið.

## Bergur breyt fótin

Bergur Midjord hjá B36 hevur brotið fótin og skal halda frí frá fótbólti í upp til 6 vikur. Sum vit greiddu frá í síðstu viku, var tað undir einum venjingardysti á USA-ferðini hjá landsliðnum, at Bergur var ógvusliga takklaður. Eftir at hann kom heim, vóru kanningar gjørdar av fótinum, og illgrunin um brot í fótinum var váttaður. Nú noyðist álopssinnaði miðvallarspælarin halda at frí í eina tið, og hann verður tí ikki tøkur hjá B36 í teimum fyrstu steypa- og landskappingardystunum.

## Gunnar nú GÍ’ari

Gøtumenn hava tryggjað sær undirskriftina hjá Gunnar Nielsen, sum tey bæði seinnu árini hevur spælt við ÍF. Gunnar kom til ÍF, tá teir í fyrraári styrktu sær um hópin móti kappingarenda. Í fjør var hann ikki í so stóran mun partur av hópinum, men hetta komst mest av einum vøddaskaða í búkinum, sum áhaldandi argaði.

Hóast danska navnið, so er talan um argentinskan spælara, sum tó hevur danskar røtur í abbanum. Gunnar spælir fyri tað mesta á framrættaða miðvøllinum, men kann eisini nýtast í álopinum.

## Heidi kappast í Danmark

Heidi Andreasen, sum vann eitt bronsuheiðursmerki á paralympisku leikunum í Athen, fer nú aftur at royna seg í altjóða kapping. Heidi skal verða við í Danish Open, sum verður hildin í Esbjerg í døgunum 11. og 12. mars. Við á ferðini til Danmarkar verður landsliðsvenjarin Jón Bjarnason.

## Andrew aftur við Fremad

Andrew av Fløtum spældi við aftur hjá Fremad Amager um vikuskiftið, og nú eydnaðist tað liðnum at vinna aftur. Dysturin ímóti Næstved endaði við 1-0 sigri til Fremad Amager. Einasta málið í dystinum kom eftir ein góðan tíma, tá ið Martin Skov skoraði. Andrew av Fløtum byrjaði dystin á beinkinum, men hann var sendur á vøllinum frá byrjan í seinna hálvleiki.